# Listanátt í Norðurlandahúsinum

**Leygarkvøldið var listanátt í Norðurlandahúsinum. Hetta var eisini setanin av Summarframsýningini 2006. Á kvøldinum var tónleikur og eisini røða av donskum listafrøðingi, ið umrøddi verkini á listaframsýningini**

FRAMSÝNING
*Johan Jacobsen*
johan@sosialurin.fo



Fuglur í klædningi



Verk eftir Titu Vinther hanga úti við vindeyguni í Klingruni

Parkeringsøkið var fylt kring Norðurlandahúsið, tá ið stásiliga mentanarhúsið lat dyrnar upp fyri almenninginum og bjóðaði vælkomin til ársins Summarframsýning. Tiltakið var eitt sindur forkunnugt við at tað byrjaði kl. 22.00, men rættiliga nógv lótu seg freista av at koma framvið hetta kvøldið. Og ímillum tey vitjandi vóru heldur ikki so fá úr tí unga ættarliðnum. Undan og eftir setanarrøðuna var tónleikur á skránni.

At byrja við var tónleikur í forhøllini. Uni Reinert Debess við Band – Búi Dam, Edvard Nyholm Debess og Rógva á Rógvi – ið spældi blueskend løg við orðum eftir Nyholm Debess. Síðan var farið inn í Klingruna har Niels Halm, stjórin í húsinum, bjóðaði øllum vælkomnum. Hann gav orðið víðari til Dagmar Warming, listafrøðing, ið hugleiddi yvir verkini.

## Summarframsýngini 2006

Setanarrøðan varð hildin við einum stórum málningi eftir Kára Svensson í bakgrundini. Heitið á málninginum, ið var umleið sjey metrar langur og tríggjar metrar høgur, er Norðhavið. Í síni røðu, legði Dagmar Warming dent á, at breiddin í føroyskum listaverkunum var einki annað enn ein styrkur. Listafrøðingurin legði fyri við at viðganga, at hennara samband til føroyska list, sum hjá so mongum øðrum, var gjøgnum verk hjá Sámal J. Mikines. Hon er listastovnsleiðari í Danmark, á “Museum for Religiøs Kunst i Lemvig”, og hevur m.a. sýnt fram verk eftir Mikines. Warming samanbar listina við ein lívsdans, sum fleiri eru við í. Og umstøðurnar skulu vera tær bestu fyri hendan dansin, tí eingin veit at siga, hvør spírin verður til ta vøkru blómuna. At enda við ynskti hon, at tey ymisku listafólkini framyvir fóru at hava møguleika at luttaka í listarliga lívsdansinum í Føroyum við teirra instrumentum og ymisku úttrykkum. Við hesum orðum var Summarframsýningin 2006 sett.

## Mannahár og fuglar í klædningi

Úti við vindeyguni í Klingruni hekk nakað forvitnisligt, ið fekk fleiri at steðga á. Hetta vóru tvey segl eftir Titu Vinth-er. Hesi hingu niður úr loftinum. Tey eru fýra metur til longdar og vovin, ikki úr ull, men úr mannahári. Á framsýningini var tað serliga verkini hjá Edward Fuglø, ið vakti ans hjá fólki. Tey hingu niðri í Dansistovuni og var har, mest sum allatíðina, heilt fitt av fólki savnað.

**FAKTA**

- Við á framsýningini í ár eru Edward Fuglø, Sigrun Gunnarsdóttir, Astri Luihn, Hans Pauli Olsen, Guðrið Poulsen, Eyðun av Reyni, Kári Svensson og Tita Vinther
- Setanarrøðuna helt Dagmar Warming, listafrøðingur og stjóri fyri “Museum for Relgiøs Kunst i Lemvig”

SUNDA KOMMUNA

**Varaleiðari til Dagstovnin við Stórheygg í Hósvík**

Sunda Kommuna søkir eftir varaleiðara til dagstovnin at byrja tann 15. august 2006 ella eftir nærri avtalu.

Starvið er 35 tíma starv.

Dagstovnurin er skipaður sum ein felags eind við børnum frá 0 til 10 ár.

**Vit ynskja, at umsøkjararnir:**
- hava hug til, saman við leiðara og starvsfólki, at seta námsfrøðina í hásæti við at gera endamálsorðingar og annað í hesum sambandi,
- vilja skapa trivnað fyri børn og vaksin á stovninum,
- hava virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og foreldrunum.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran, Honnu Thøgersen, tlf. 255788.

Umsóknir við avriti av prógvi v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. juli 2006 og skulu sendast til:

Sunda Kommunu
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki.

Dagstovnurin við Stórheygg í Hósvík er ein av trimum dagstovnum í Sunda Kommunu. Dagstovnurin er normeraður til 58 børn, hevur eitt ár á baki, og har eru í løtuni 11 starvsfólk. Dagstovnaleiðararnir á økinum, tvs. í Hósvík, á Oyrarbakka og í Hvalvík, hava eitt gott og tætt samstarv í samráð við kommununa.